LM-050/2025

Sólgerð Hjørleifsdóttir

FYLGISKJAL 12

Fra: Hans Jacob á Líknargøtu <hj@eyp.fo>
Sendt: 16. september 2025 10:51
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Eysturoyarportalurin - Evnið: TIL HOYRINGAR: Uppskot til nýggja miðlastuðulslóg

Góðan dagin,

Vit frá Eysturoyarpotalinum vilja koma við hesum stuttu viðmerkingum til "**Uppskot til nýggja miðlastuðulslóg**".

Fyrst av øllum, lat tað verða sagt beinanvegin og sligið rimmar fast við sjey tumma seymið. Tað als ikki nakað gott hugskot, sum verður borið fram við "*at seta á stovn ein nýggjan tíðindamiðil í senn, so tað ikki gerst ov smábýtt*", sum verður sagt í teldupostinum.

Hatta hugskotið ella ætlanin, eigur at verða tikin vekk av "tekniborðinum" ongantíð ov skjótt og er als ikki nakað sum tað almenna skal blanda seg uppí við.

At KVF er alment og verður tryggja millónaupphæddir gjøgnum skattagjaldarans pengar er eitt fakta, meðan privatu miðlarnir mugu "knokla" hvønn tann einasta dag fyri at fáa endarnar at røkka saman, við at renna eftir lýsingum.
Og so er ætlanin, at seta ein "almennan" miðil á stovn, við almennum pengum, sum so skal framyvir kappast um lýsingarpengarnar hjá verðandi privatum miðlum, er einki minnið enn eitt álop á privatu vinnuna og teir "spælireglar" sum eru galdandi.

Tískil er hetta eitt "hol í høvdið" hugskot, sum verður borið fram og má takast burtur alt fyri eitt!

Um tað almenna veruliga vil styrkja privatu miðlarnar, so skuldi heldur verið hugt uppá, hví KVF sleppur at "taka" privatar lýsingar inn - bæði gjøgnum í sjónvarrpi og útvarpi, meðan KVF í forvegin longu verða stuðla við millóna upphæddum hvørt ár. Tað er ein spurningur sum tit kunnu seta tykkum sjálvum!

Vinarliga | Kind Regards

Hans Jacob á Líknargøtu
Stjóri
Tlf: +298 742222 | hj@eyp.fo
Eysturoyarportalurin

EYP
EYSTUROYARPORTALURIN

www.eyp.fo